# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 27.06.2024 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:
Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari:



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 32/24 | 24/00184-6 | Dagførd gjøld - kvøldskúlin og tónlistaskúlin. Frágreiðing og tilmæli | 3 |
| 33/24 | 24/00287-6 | Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 339al LV | 6 |
| 34/24 | 24/00358-7 | 24/00358 - Frágreiðing og tilmæli - Umhvørvisátak - minni burturkast, meira endurnýtsla | 8 |
| 35/24 | 24/00370-3 | Báta- og listasavnið - Umsókn um rakstarstuðul 2024 - Frágreiðing og tilmæli | 10 |
| 36/24 | 24/00418-1 | Skúlin í Eysturkommunu - Játtan til serundirvísing í innskúlingini. Frágreiðing og tilmæli | 11 |
| 37/24 | 24/00419-3 | Broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu | 13 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38/24 | 24/00190-3 | Ljós í Sarpugerði | 14 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 32/24 Dagførd gjøld - kvøldskúlin og tónlistaskúlin. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.06.2024 | 47/24 | 24/00184-6 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.06.2024 | 26/24 | 24/00184-6 |
| 3 Býráðið | 27.06.2024 | 32/24 | 24/00184-6 |

**Málslýsing:**

**Tónlistaskúlin:**

Gjøld og leiðreglur í tónlistaskúlanum í Eysturkommunu eru komin eitt sindur út av lagi. Tað er tí ynskið hjá fyrisitingini at gera hetta eitt sindur meira klárt, einsrættað og lættari at fyrisita. Hetta eisini í samband við, at Eysturkommuna aftaná summarferiuna fær eina nýggja heimasíðu, ið eisini skal røkja bókning og gjald í samband við tónlistaskúlan.

Núverandi støðan:

- 400 kr. hálvárliga fyri barnið
  Møguligt er at byrja mitt í eini skúlahálvu, um pláss verður tøkt og/ella um nýtt barn kemur til skúlan.
- Í summum førum verður endurgjald goldið, um næmingurin støðgar beinanvegin aftur.
- Systkinaavsláttur er 50%, tvs. 200 kr. hálvárliga
- Um ein spælir meira enn eitt ljóðføri er avslátturin 50% á ljóðføri nr. tvey, tvs. 600 kr. í alt.

Uppskot til komandi støðu:

- 400 kr. hálvárliga fyri barnið
  Bert møguligt at byrja í januar og í august
- Ikki møguligt at fáa gjald sítt endurgoldið
- Systkinaavsláttur verður 25%, tvs. 300 kr. hálvárliga
- Hóast ein spælir meira enn eitt ljóðføri, er eingin avsláttur

**Kvøldskúlin:**

Gjøldini í kvøldskúlanum í Eysturkommunu er eitt sindur ógreið. Tað er tí ynskið hjá fyrisitingini at gera hetta meira einsrættað og lættari at fyrisita. Hetta eisini í samband við, at Eysturkommuna til kvøldskúlaárið 24/25 fær eina nýggja heimasíðu, ið skal persentera kvøldskúlan væl.

Núverandi støðan:

- Skeiðini kosta: 1900, 500, 400, 300, 200 kr og ókeypis
  Tað er ikki logiskt, hví skeiðini hvør sær kosta tað tey kosta.

- Ókeypis skeið eru: Barnadansur, talv fyri børn, barnakór, skeið fyri orðblind, undirvísing fyri tilflytarar og heilsufremjandi venjing.

Uppskot til komandi støðu:

- 500 kr fyri longri skeið (hesi eru allan veturin, men tímatalið og uppbygnaðurin kann variera)
  300 kr fyri stutt skeið og vikuskiftisskeið (her kann tímatalið eisini vera ymiskt)
  200 kr fyri ávv. barnadans, talv fyri børn og barnakór av tí, at hetta eru skeið fyri børn.
- Ókeypis: Orðblindaskeið (og møguliga barnadansurin)
- Prutlkoyrikortið hevur kostað 1.900 kr. rættiliga leingi, so tað kann vera, at hetta verður regulerað. Hetta hendur í samstarv við kvøldskúlan í Fuglafirði.

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| Tónlistaskúlin fær árliga 8.600 kr. meira inn, um systkinaavslátturin verður broyttur.<br>Tónlistaskúlin fær árliga 1.000 kr. meira inn, um 2. ljóðføriavslátturin verður avtikin.<br>Tónlistaskúlin fær árliga í alt 9.600 kr. meira inn (útroknað uppá tøl frá des 23)<br><br>Í kvøldskúlanum gongur alt nøkulunda upp |

| Tilmæli |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við uppskotinum |

**Mentanarnevndin 18. juni 2024**
Tónlistaskúlin: Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum
Kvøldskúlin: Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum, men mælir til at fyrisitingin kannar, hvussu tað fer at ávirka tey ókeypis skeiðini, um tey fara at kosta eina symbolska upphædd (t.d. 200 kr.)

**Fíggjarnevnd 24. juni 2024**
Samtykt at fylgja tilmælinum hjá Mentanarnevndini

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini, við tí broyting at møguleiki skal vera fyri at taka nýggjan næming inn í tónlistaskúlan, um onkur næmingur gevst frá mitt í árinum, og at systkinaavslátturin verður tann sami.

Eysturkommuna

## 33/24 Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 339al LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.06.2024 | 22/24 | 24/00287-6 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 33/24 | 24/00287-6 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 339al í Leirvík, í umsóknini verður søkt um frávik til hæddarviðurskifti á bilhúsinum.<br><br>Sambart Byggikunngerðin punkt 2.2.3.4 **Bilhús, bilskýli, úthús og líknandi smáir bygningar**, kunnu bilhús byggjast tættari marki enn 2,5 metur.<br><br>Í stk. 2.1 stendur: *at eingin partur av útveggjum ella tekju á bygninginum, íroknað møguligan brandkamb, má, innan fyri ein fráleika á 2,5 m frá marki, vera hægri enn 2,5 m yvir planeringshædd.*<br><br>Umsøkjarin søkir, um at hækka bilhúsið frá 2,5 m og upp til 2.945 m, ein øking á 0.445 m.<br><br>Bilhúsið er staðsett 1 metir frá markalinjuna til matr. nr. 339a, ið er ogn hjá Eysturkommunu.<br><br>Umsiting mælir til, at geva frávik, tí eingin hús verða bygd á matr. nr. 339a og hetta fer heldur ikki hava ávirkan á brunakrøv o.a. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Avvatningsgrøv liggur fram við byggimark og kann hetta føra við sær eykakostnað til avvatningsrør. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. juni 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini.

Eysturkommuna

## 34/24 24/00358 - Frágreiðing og tilmæli - Umhvørvisátak - minni burturkast, meira endurnýtsla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 19.06.2024 | 8/24 | 24/00358-7 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 34/24 | 24/00358-7 |

**Málslýsing:**

Á fundi 14. mai 2023 viðgjørdi Umhvørvis – og trivnaðarnevndin uppskot um um "umhvørvisátak – minni burturkast, meira endurnýtsla – 23/00277. Samtykt varð tá, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við málinum.

Eftirfylgjandi hevur so umsitingin havt hoyring úti hjá stovnunum í kommununi um at tálma nýtsluna av óneyðugum einnýtisvørum í kommununi. Viðmerkingar komu frá flest øllum, sum fingu hesa hoyring. Umhvørvis – og trivnaðarnevndin umrøddi svarskrivini á fundi 23. Mai 2024.

Semja var á fundinum um at seta uppskotið í verk og at leggja knýta skiljing av burturkasti uppí uppskotið.

Fylgjandi uppskot verður lagt fyri Umhvørvis – og trivnaðarnevndina at taka støðu til:

**Nýtsla av óneyðugum einnýtisvørum**:

Eysturkommuna ynskir at tálma nýtsluni av óneyðugum* einnýtisvørum í kommununi. Tí hevur Eysturkommuna ætlanir um, at kommunalir stovnar í Eysturkommunu framyvir ikki brúka óneyðugar einnýtisvørur eftir 1. august 2024.

Viðmerking:

Óneyðugar einnýtisvørur eru vørur so sum borðbúnaður, lok, súgvirør, og annað óneyðugt einnýtis, ið endar sum burturkast, men kann erstattast av varandi vøru, ið verður vaskað og endurnýtt.

Uppskotið er ein liður í, at kommunan hevur eina skyldu at verja umhvørvið og verða við til at gera sítt til, at heimurin er eitt gott stað til komandi ættarlið. Við at kommunan og kommunalir stovnar ganga undan at vísa umhvørvisligt skynsemi er vónin, at hetta smittar av á borgarar, privata vinnulívið og felagsskapir, soleiðis at hesi eisini gera sítt til at minka um burturkast og verja umhvørvið. Somuleiðis stuðlar hetta undir Heimsmál nr. 12, sum er at tryggja burðardygg nýtslu – og framleiðslumynstur.

| |
|---|
| *Óneyðugar einnýtisvørur er skrivað,  tí at tað framvegis verður mett neyðugt við ávísum einnýtisvørum, sum fyribyrgja smittu.<br><br>**Skiljing av burturkasti:**<br>Kommunalir stovnar í Eysturkommunu skulu framyvir leggja seg eftir at skilja burturkast, sum verður latið til IRF og á bingjuplássið.<br><br>Eysturkommuna veitir, saman við IRF, sum er ráðgevi á hesum økinum og er til reiðar at hjálpa, vegleiðing og kunning um, hvussu stovnarnir skulu fyrihalda seg til hetta. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður at seta tiltøkini í verk |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 19. juni 2024**
Mæla til at seta tiltøkini í verk

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Umhvørvis – og trivnaðarnevndini.

## 35/24 Báta- og listasavnið - Umsókn um rakstarstuðul 2024 - Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.06.2024 | 48/24 | 24/00370-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.06.2024 | 29/24 | 24/00370-3 |
| 3 Býráðið | 27.06.2024 | 35/24 | 24/00370-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Tummas Justinussen, formaður, søkir vegna Báta- og listasavnið um árligan stuðul fyri 2024.<br><br>Umbiðin upphædd: 170.000 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 170.000 kr er settar av til endamálið. Rakstrarkonto 52812, "Bátasavnið" |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at lata stuðul |

**Mentanarnevndin 18. juni 2024**
Mentanarnevndin mælir til at lata stuðul.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum ha Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini

## 36/24 Skúlin í Eysturkommunu - Játtan til serundirvísing í innskúlingini. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.06.2024 | 51/24 | 24/00418-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.06.2024 | 30/24 | 24/00418-1 |
| 3 Býráðið | 27.06.2024 | 36/24 | 24/00418-1 |

| Málslýsing: |
|---|
| Bakgrund:<br>Skúlin i Eysturkommunu hevur saman við Fuglafjarðar skúla søkt um at fáa játtað eina serstovu til skúlarnar at vera saman um. Tað var væntað, at hetta var játtað, men so bleiv ikki í hesum umfari. Herumframt er skúlin nakað skerdur, og hetta ger, at serliga serundirvisingin er hart rakt.<br><br>Í hesum sambandi er ynskiligt, at skúlastjórin fær játtað 25 tímar/vikuna til skúlaspíran og innskúlingina. Hetta má játtast gjøgnum kommunalu forskúlaskípanina.<br>Ætlanin er, at henda játtan kann brúkast til at styrkja ta generellu serundirvísingina, ið er undir trýsti.<br><br>Viðmerkingar frá fyrisitingini:<br>Fyrisitingin ger vart við, at kommunan við hesi játtan førkar seg inn á landspolitisk øki.<br>Afturat hesum má nevnast, at um ein partur av játtanini fer til førleikamenning av starvsfólki, er hetta førleikamenning av fólki, ið ikki eru kommunalt sett. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| 25 tímar/vikuna í skúlaspíranum gevur eina ársløn uppá umleið 430.000 kr. |

| Tilmæli |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 20. juni 2024**

Mentanarnevndin mælir til at 25 tímar verða játtaðir til serundirvísingina í innskúlingini í gjøgnum forskúlaskipanina, sum er kommunal.

Herumframt mælir mentanarnenvndin til, at skúlastjórin fær boð skjótast gjørligt um niðurstøðuna soleiðis, at hann veit, hvørjum hann kann arbeiða við.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2024**

Hjalti Dalheim og Magnus Skoralíð taka undir við tilmælinum hjá Mentantanevndini.
Per Martin Gregersen tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðið 27. juni 2024**

Málið er samykt við 8 atkvøðum fyri og eina blankari.

Atkvøður fyri tilmælinum hjá Mentanarnevndini:
Hjalti Dalheim, Magnus Skoralíð, Katrin Kjartansdóttir, Marjun Andreasardóttir, Petur Suni Jacobsen, Hanna Jensen, Marita Klein Joensen og Rúni Justinussen.

Per Martin Gregersen atkvøður blankt.

## 37/24 Broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.06.2024 | 23/24 | 24/00419-3 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 37/24 | 24/00419-3 |

**Málslýsing:**

Ynski er um, at broyta part av matr. nr. 72f og 65a frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, og at matr. nr. 72g verður allur gjørdir til øki E, Almennir stovnar. Hetta fyri at framtíðartryggja møguliga útbygging av Gøtubrá í Norðragøtu.

**Lýsing, verandi støða:**

- Matr. nr. 72g liggur í dag sum øki E, Almennir stovnar og ein partur av matriklinum liggur sum øki B1, Alternativ íbúðarbygging.
- Matr. nr. 65a liggur í dag sum øki H, Frílendi.
- Partur av matr. nr. 72f liggur sum øki H, Frílendi.

**Lýsing, framtíðar støða:**

- Matr. nr. 72g verður broyttur til øki E, Almennir stovnar.
- Partur av matr. nr. 72f skal broytast frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.
- Partur av matr. nr. 65a skal broytastt frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.

Mælt verður til, at gera hesar broytingar í býarætlanini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. juni 2024**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. juni 2024**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini

## 38/24 Ljós í Sarpugerði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.02.2024 | 5/24 | 24/00190-3 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.02.2024 | 11/24 | 24/00190-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.02.2024 | 5/24 | 24/00190-3 |
| 4 Býráðið | 29.02.2024 | 11/24 | 24/00190-3 |
| 5 Fíggjarnevnd | 24.06.2024 | 27/24 | 24/00190-3 |
| 6 Býráðið | 27.06.2024 | 38/24 | 24/00190-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur biða um tvey tilboð uppá nýggja ljós í Sarpugerði i Norðragøtu, hetta er fyri at betra um ljósviðurskiftini kring vøllin i Sarpugerði.<br><br>Uttanhýsis ráðgeving kannar tilboðini og hvørji ljós hóska seg best, tilmæli kemur í komandi viku.<br><br>**Ískoyti 20/6-24**<br>Uttanhýsis ráðgevi hevur kanna málið og er komin við niðurstøðu. Eisini hevur ymiskt samskifti verði við veitarar og onnur, umframt at umsitingin hevur viðgjørt málið meir. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka av tilboðnum frá GroAqua. |

### Mentanarnevndin 20. februar 2024

Nevndin er kunnað og bíðar eftir tilmæli frá ráðgevara.

### Byggi - og býarskipanarnevnd 22. februar 2024

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2024**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 29. februar 2024**
Málið tikið av skrá.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka av tilboðnum frá GroAqua.

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini dagf. 24. juni 2024.

fundurin lokin

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen